# Jólasiðirnir eru ymiskir í Týsklandi

Í Týsklandi kunnu jólasiðirnir verða ymiskir frá landsluti til landslut. Sankta Nikolásdagin hin 6. desember, sum mest er fyri børn, verður nógv gjørt burturúr í summum landslutum. Men gávuhandanninar fara ikki fram fyrr enn á Jólaaftansdegi. Í Týsklandi verður gjørt, sum her hjá okkum. Gávurnar verða lagdar undir jólatræið. Tann góði maturin kemur longu á borðið tann 24. desember, í summum støðum tann 25. desember. Ein vanligur jóladøgurði í Týsklandi, er stokt gás. Børnini fáa gávur frá "Der Weinachtsmann", sum er átøkur Sankta Nikolás. Tað kemur eisini fyri, at børnini fáa gávur frá "Das Christkind", sum kann verða ein ímynd av Jesus-barninum. Økið við Dresden er tað kendasta økið í Týsklandi tá tað kemur til framleiðslu av jólagávum- og lutum. Í ein mánað hava íbúgvarnir í Dresden "Striezelmarkt" – Strieselmarknaðin, sum er víðagitin kring heimin. Millum kendastu vørurnar eru Dresden Stollen fruktkøkan, Pulsnitzer ingifersbreyð, trælutir frá Erzegebirge Fjøllunum, bohemiskt glas, Meissen porselen o.a. vørur.






















